ISBN 99918-955-7-4

# Tørvur á kollegium í Klaksvík

## - Hvat halda tey ungu?

Olga Biskopstø,Dennis Holm og Gestur Hovgaard

**ARBEIÐSRIT NR. 3/2002**

*Um arbeiðsrit:*

**Arbeiðsrit eru samfelagsfakliga grundað arbeiði, sum eru minni í vavi og dýbd enn verulig granskingarprojekt. Hesi rit kunnu eitt nú vera umbidnar kanningar, tvs. kanningararbeiði sum granskingardepilin ger móti gjaldi. Hetta kunnu eisini vera ávegis arbeiði av størri granskingarprojektum, undirvisingar- og kunningartilfar ella líknandi. Arbeiðsrit vera altíð skrivaði á føroyskum. Hava fólk handrit, sum tey halda eru egnaði til útgávu í Arbeiðsriti, eru tey vælkomin at seta seg í samband við depilin (sí adressu á forsíðuni).**

**Formæli**

Sum eitt lið í arbeiðinum at gera umstøðurnar í Klaksvík betri fyri ungdóm hiðani og aðrastaðni frá, ið gongur í skúla ella er í læru, heitti umsitingin í Klaksvíkar Kommuna á okkum, um at kanna tørvin á einum kollegium/skúlaheimi. Til at fáa greiðu á hesum spurningi, fyriskipaðu vit eina spurnarblaðskanning millum næmingar og lærlingar í Klaksvík. Endamál okkara er sostatt at kann eftir, hvat ungdómurin sjálvur heldur um hendan spurningin. Kanningin varð liðug í februar mánaði í ár, og er hetta Arbeiðsrit ein lýsing av úrslitunum í kanningini.

Næmingar í 2. HTX á Tekniska skúla í Klaksvík hava verið við í arbeiðinum at fyri-skipa kanningina. Eisini hevur Kári Purkhús hjálpt til við innsavnan av spurnarbløðum. Barbara Biskopstø hevur staðið fyri uppseting og innlesing av spurnarbløðunum í NSD-Stat. Ólavur Waag Høgnesen hevur staðið fyri rættlestri. Ein tøkk til øll.

Granskingardepilin stendur fyri útgávuni, men viðmerkjast skal, at arbeiðið er gjørt av okkum sum einkultpersónum. Eftirverandi mistøk standa fyri okkara rokning.

Klaksvík, september 2002

*Olga Biskopstø*, *Dennis Holm* og *Gestur Hovgaard*

# Innihaldsyvirlit

Úrtak ........ 4
Endamál ........ 4
Framferðarháttur ........ 4
Hvør hevur svarað spurnarblaðnum? ........ 6
Meta tey ungu, at tørvur er á kollegiubygging? ........ 7
  Hvørji eru tey, sum halda tørv vera á kollegium? ........ 8
  Hvørji meta tey ungu hava tørv á kollegium? ........ 9
  Høvdu tey ungu flutt á kollegium? ........ 10
Ungdómurin skal hava ávirkan á, hvussu eitt kollegium skal byggjast ........ 11
Samandráttur ........ 12
  Tørvur er á einum kollegium ........ 13
  Tørvurin – hvør og hví? ........ 13
  Ungdómurin vil hava ávirkan ........ 14
Fylgiskjal 1. ........ 15

## Úrtak

*Hetta arbeiðsritið viðgerð spurningin, um tað er tørvur á einum kollegium í Klaksvík? Harumframt verður eisini lýst, hvussu stórur tørvurin er á einum kollegium, hvørji hava hendan tørv, og hvat tey ungu halda um ætlaninar at byggja eitt kollegium í Klaksvík. Ritið er grundað á eina spurnarkanning millum ung í Klaksvík.*

## Endamál

Endamálið við hesari frágreiðing er at lýsa, hvat ungdómurin í Klaksvík undir útbúgving/í læru heldur um ætlanina at byggja eitt kollegium í býnum, og um tey sjálvi høvdu gjørt nýtslu av einum slíkum tilboði.

Í Klaksvík eru nógvir skúlar og læürupláss, og Klaksvík fer væntandi eisini at mennast sum skúlabýur í framtíðini. Ein náttúrligur partur av einum skúlaumhvørvi eru kollegium, men sum er, so er einki kollegium í Klaksvík.

- Eitt **kollegium** er eitt íbúðarstað til ung undir útbúgving (t.v.s. næmingar, lesandi og lærlingar)
- Eitt **kollegium** er vanliga samansett av kømurum og/ella smáum íbúðum til einstaklingar ella pør.
- Á einum **kollegium** eru ofta møguleikar fyri felags fasilitetum: hugnastovu, køkum, høli til ítriv o.s.fr.
- Leigan av einum **kollegium** er lagað til fíggjarligu orkuna hjá teimum ungu (men leigan er tó oftani stórur partur av teirra mánaðarligu útreiðslum).

Spurnarkanningin kann vera við til at geva eina ábending um, hvør tørvurin er á einum tílíkum tilboði, og hvørji hava hendan tørvin.

## Framferðarháttur

Frágreiðingin er sum nevnt grundað á eina spurnarkanning, ið varð gjørd millum ung í Klaksvík um árskiftið 2001/2002. Tilsamans vórðu 300 spurnarbløð borin út, og av teimum vórðu 217 svaraði og latin inn aftur.

Tá ið slíkar spurnarkanningar verða gjørdar, er tað ikki óvanligt at tey, ið svara spurnarblaðnum, kunnu hava eina aðra fatan av endamálinum og sjálvum spurningunum, enn tey, ið skipa fyri kanningini. Fyri at fyribyrgja slíkum trupulleikum, varð spurnarblaðið gjørt í samstarvi við næmingar á 2 HTX á Tekniska Skúla í Klaksvík. Í nøkrum tímum í samfelagsfrøði varð høvuðspurningurin gjøgnumgingin, og orð varð skift um, hvørjir útgreinaðir spurningar áttu at verið við í kanningini. Tá fyrsta útkastið til spurnarblað fyrilá, vóru hesi ”roynd” hjá øðrum næmingum á skúlanum. Hetta varð so aftur grundarlagið fyri endaliga spurnarblaðnum (sí Fylgiskjal 1.).

Eitt, ið vit varnaðust gjøgnum undankanningina var, at øll ikki vistu hvat orðið *kollegium* merkir. Tí varð eisini gjørt av, at greiða frá á forsíðuni á spurnarblaðnum, hvat eitt kollegium er[1], umframt at tað á forsíðuni eisini varð greitt frá endamálinum við kanningini.

Ein annar vansi við spurnarkanningum kann vera, at tey, ið svara nakað ávíst, gera hetta, tí tey gjarna vilja vera positiv, tí okkurt ”skal” ella ”eigur” at henda á hesum økinum. Til at fyribyrgja hesum, hava vit gjørt spurnarblaðið neutralt, og sjálvsagt heldur ikki víst á, hvat vit halda í hesum sambandinum, eitt nú tá spurnarblaðið varð savnað inn.

Olga Biskopstø og Kári Purkhús savnaðu spurnarbløðini inn við góðari hjálp frá næmingum á Tekniska Skúla. Innsavningin fór fram á skúlunum í Klaksvík og á Kambsdali. Orsakað av, at flestu lærlingar í býnum um hetta mundið vóru á skeið á Tekniska Skúla, fingu vit eina góða umboðan av hesum bólkinum eisini.

Tey 217 innkomnu spurnarbløðini eru skrásett og viðgjørd í hagtalsforritinum NSD-Stat.

[1] Av innkomnu svarunum vísir tað seg eisini, at áleið 22 % (47 í tali), ikki visti hvat eitt kollegium var, áðrenn tey hoyrdu/lósu um tað í spurnarblaðnum.

## Hvør hevur svarað spurnarblaðnum?

Sum nevnt, so er málbólkurin fyri kanningini ungdómur í læru ella undir útbúgving. Ein ungdómur er vanliga at meta sum aldursbólkurin 16-24 ár, og vóru í februar 2002 áleið 680 fólk í hesum aldursbólki í Klaksvík. Ikki ber til heilt neyvt at siga, hvussu stórur partur av hesum eru lesandi ella í læru. Men sæð í mun til talið av svaraðum spurnarbløðum, er rímuligt at siga, at meira enn helmingurin av teimum lesandi og teimum í læru hava svarað spurnarblaðnum, og er hetta nøktandi úr einum hagtalssjónarmiði.

Nakrir næmingar ella lærlingar eru sjálvsagt eldri enn 24 ár, og valdu vit eisini at lata hesi fáa høvið at svar; tí hóast hesi ikki eru partur av málbólkinum í kanningini, so kunnu tey, ið eru eldri enn 24 ár, eisini umboðað ein tørv, hvat viðvíkur kollegium. At nøkur eru eldri enn 24 ár, er tó ikki nakar veikleiki fyri kanningina, tí heili 95 % av teimum, ið svarað hava, eru millum 16 og 24 ár.




Nøkur av teimum, sum svaraðu, eru ungdómar, sum koma úr øðrum pørtum av landinum. Vit hildu tað vera neyðugt at lata hesi svara spurnarblaðnum, tí roknast má við, at eisini framyvir fer ungdómur uttaneftir at koma til Klaksvíkar í útbúgvingarørindum, og hesi umboða sostatt eisini ein møguligan tørv á kollegium.

Hvat kynsbýtinum í kanningin viðvíkur, so eru 55 %, av teimum, ið svaraðu spurnarblaðnum, drongir, og 45 % eru gentur, og hetta kynsbýtið er í stóran mun tað sama sum býtið í hesum aldurbólkunum í Klaksvík.



Av teimum, sum svaraðu, búgva 72 % heima hjá foreldrunum ella hjá familju. Meðan tað eru 27 %, ið antin búgva til leigu, í egnari íbúð ella aðrastaðni enn hjá foreldrunum. Hesin fjórðingurin fevnir í ávísan mun um næmingar og ella lærlingar, ið koma koma aðrastaðni frá[2].

## Meta tey ungu, at tørvur er á kollegiubygging?

Sum nevnt omanfyri, so er almenni spurningurin í kanningini, hvørt tey ungu halda, at tørvur er á einum kollegium í Klaksvík. Av teimum 217, ið valdu at svara spurnarblaðnum, halda 62 %, at tørvur er á einum tílíkum tilboði. Ein heilt lítil partur, bert 1 %, heldur ikki, at tørvur er á einum kollegium, meðan heili 37 % søgdu seg ikki vita, um tørvur er á einum kollegium.




Eins og myndin omanfyri vísir, so er tað ein greiður skilnaður millum ein stóran meiriluta, sum heldur tørvur er á einum kollegium, og ein stóran minniluta, sum sigur seg ikki vita um nakar slíkur tørvur er.

Ein av orsøkunum til, at umleið 37 % siga seg ikki vita, um tørvur er á einum kollegium, kann vera, at hesi ikki hava nóg gott grundarlag at taka støðu út frá. Hendan met-

[2] Við at spyrja tey, sum vanliga hýsa lesandi uttaneftir, komu vit fram til, at umleið 50 lesandi og lærlingar eru aðrastaðni frá.

ing verður eisini undirbygd av, at bara ein góður triðingur av hesum bólkinum frammanundan kanningini vistu, hvat eitt kollegium var. Um samanborið verður við tey, ið søgdu at tørvur er á einum kollegium, so vistu útvið 90 % av teimum, hvat eitt kollegium var, áðrenn tey lósu um tað í kanningini.

Afturat hesum kann sigast, at ein stórur partur av teimum, ið siga seg ikki vita um tørvur er á einum kollegium, eru ung í 16-17 ára aldrinum. Hesi eru heimabúgvandi og hava neyvan hugsað um at flyta heimanifrá, tí onki annað tilboð er á hesum økinum.

Nøkur av teimum, ið hava víst á, at tey meta at tað er tørvur á einum kollegium í Klaksvík, hava eisini brúkt møguleikan at gera skrivligar viðmerkingar hesum viðvíkjandi. Nakrar av viðmerkinginum vóru:

- *Bara vit fáa eitt kollegium, so hevði tað verið gott!*
- *Komið við tí skjótt!!!*
- *Tað hevði verið ógvuliga gott at fingið, eg vóni at tað verður skjótt, góðan arbeiðshug!!*
- *Skundið tykkum at byggja eitt kollegium!*
- *Um Klaksvíkin skal gera seg meiri galdandi innan undirvísingarøkið, er neyðugt við bústaðarmøguleikum!*

Grundað á kanningina, so kann greitt staðfestast, at tørvur er á einum kollegium. Tað áhugaverda at viðgerða nærri, er spurningurin um, hvussu reellur hesin tørvur man tykjast at vera. Hetta kunnu vit fáa eina ábending um, hyggja vit eftir eitt nú hvat eyðkennir tann bólkin, sum heldur tørv vera á einum kollegium.

### *Hvørji eru tey, sum halda tørv vera á kollegium?*

Tá ið hugt verður nærri eftir, hvørji halda ein tørv verða á kollegium, so hava tey nøkur ávís eyðkenni.

Í fyrsta lagi er í stóran mun talan um *ung undir 20 ár, ið búgva heima*, ið halda ein tørv verða á kollegium (uml. 80 í tali av teimum 115, sum vístu á, at ein tørvur er á kolleg-

ium). Afturat hesum eru eisini ein bólkur av *ungum í aldrinum undir 20 ár, ið búgva aðrastaðni* enn heima, hjá familju, til leigu, ella í egnari íbúð. Hesi eru helst lesandi úr øðrum pørtum av Norðoyggjum og úr øðrum pørtum av landinum, sum búgva inni hjá vinfólki ella kenningum. Hesin bólkurin er umleið 15 í tali.

Harumframt eru eisini *tey, ið búgva til leigu, sum vísa á ein tørv á kollegium*. Hesin bólkurin er ikki avmarkaður til nakran ávísan aldursbólk, og er heildarmyndin fyri hendan bólkin, at tey kundu hugsað sær at leiga kamar ella íbúð á kollegium ístaðin fyri á privata íbúðarmarknaðinum.

Eitt annað heildareyðkenni er, at tey, ið vísa á, at tørvur er á einum kollegium, eru í stóran mun næmingar í aldrinum 16-19 ár.

### *Hvørji meta tey ungu hava tørv á kollegium?*

Umframt at svara *ja* og *nei* uppá um tørvur er á einum kollegium, so var eisini møguleiki fyri at grundgeva fyri sínum sjónarmiðum. Tey, ið valdu at brúka hendan møguleika, kunnu sum heild bólkast í tríggjar bólkar:

- *Tey, ið vísa á, at eitt kollegium hevði gjørt tað møguligt hjá ungum at flutt heimanifrá*
- *Tey, ið halda, at næmingar og lærlingar onki hava at búgva í*
- *Tey, ið halda, at eitt kollegium skal dekka tørvin hjá ungum, ið koma til Klaksvíkar at læra*

Ungdómurin í dag gerst alsamt meiri sjálvstøðugur, og er tað tí ikki so løgið, at fleiri og fleiri ung hava hug at flyta heimanifrá. Trupulleikin er oftani, at tey ikki hava annað at velja í, enn at vera búgvandi heima hjá foreldrunum. Í so máta hevði eitt kollegium verið *ein* møguleiki, meðan ungdóms-íbúðir eisini er ein møguleiki, ið brúktur verður í grannalondum okkara.

Endamálið við einum kollegium er, at tað skal nøkta bústaðartørvin hjá næmingum og lærlingum, og eitt kollegium er í so máta ein nattúrligur partur av einum lestrar-/

lærlingaumhvørvi. Klaksvík er útbúgvingarmiðdepilin í Norðoyggjum, umframt at ung úr øllum landinum koma til Klaksvíkar í smb. við útbúgvingar innan ávís øki. Hetta merkir, at nógv ung uttaneftir koma til Klaksvíkar í útbúgvingarørindum, og júst hesi hava oftani trupulleika við at finna bústað. Tørvurin hjá teimum, ið koma uttaneftir, er sum heild meiri akuttur enn tørvurin hjá ungum í Klaksvík, ið oftast hava møguleika at velja ímillum at búgva heima hjá foreldrunum ella at fara aðrastaðni. Hugsandi er eisini, at trupulleikin við at finna bústað kann forða ungum í at koma til Klaksvíkar at nema sær útbúgving.

### *Høvdu tey ungu flutt á kollegium?*

Tey ungu í dag hava ikki møguleikan fyri at flyta á eitt kollegium her í býnum, men í spurnarblaðnum varð spurt, um tey høvdu flutt á kollegium, um møguleikin stóð teimum í boði. Tey svaraðu, sum víst á myndini niðanfyri.

Sum myndin vísur, vildi ein góð helvt *uttan iva* ella *møguliga* tikið av tilboðnum um at flutt á eitt kollegium her og nú. Í tali er talan um tilsamans 115 fólk; 25 fólk, ið *uttan iva* vildu brúkt møguleikan fyri at flutt á eitt kollegium, og 90 fólk, ið *møguliga* vildu brúkt hendan møguleikan. Harafturat hevur ein stórur triðingur ikki avskrivað møguleikan, men vildu ikki nýtt hetta høvið her og nú. 12 % eru avgjørd um, at tey als ikki vildu nýtt hendan møguleikan.






Spurt varð eisini, um tey ungu hildu, at nakrar forðingar vóru fyri, at tey fluttu á kollegium. Ein stórur partur, 70 %, vísti á, at tey dugdu ikki at síggja nakrar forðingar fyri hesum, meðan 30 % søgdu at okkurt varð, ið kundi forða teimum í at flutt á kollegium.

Tey 30 %, sum hildu forðingar vera, stúrdu serliga fyri kostnaðinum av at búgva á kollegium, meðan onnur vístu á tær meiri høgligu umstøðurnar heima við hús sum grundgeving. Nøkur fá vístu á, at tey ikki hildu at foreldrini fóru at loyva teimum at flyta á kollegium.

## Ungdómurin skal hava ávirkan á, hvussu eitt kollegium skal byggjast

Í spurnarblaðnum varð eisini spurt, um ungdómurin skal hava møguleika fyri at ávirka, hvussu eitt kollegium skal byggjast. Breið semja var um, at tað skuldi ungdómurin hava, og hetta er galdandi bæði fyri tey, ið vístu á, at tørvur er á einum kollegium, og fyri tey, ið ikki vistu, um tørvur er á einum kollegium. 90 % av teimum, ið vístu á, at tørvur var á einum kollegium, vístu eisini á, at ungdómurin skal hava ávirkan á, hvussu eitt kollegium skal byggjast. Harumframt vístu fleiri enn 85 % av teimum, ið ikki vistu, um tørvur var á einum kollegium, eisini á, at ungdómurin skal hava ávirkan á byggingina.

Umframt at svara *ja* ella *nei* uppá spurningin, um ungdómurin skal hava ávirkan á byggingina av einum kollegium, so varð eisini givið høvið til at gera skrivligar viðmerkingar á spurnarblaðnum, og vendu fleiri teirra sær til spurningin um ávirkan á byggingina.

Viðmerkingar sum hesar, vóru ikki óvanligar:

- *Um kollegium verður bygt til ung, skulu tey sleppa at siga okkurt!*
- *Næmingarnir kunnu koma við nøkrum hugskotum, um kollegium verður bygt!*
- *Tey ungu skulu hava ávirkan á hvørjir fasilitetir vera!*
- *Hevði eg verið "boss", so hevði eg fingið mær ungdómin við í, hvussu tað skal byggjast!*
- *Gott at tit spyrja ungdómin um ráð!*

Nakrar viðmerkingar vóru eisini knýttar beinleiðis at, hvussu eitt slíkt kollegium skal síggja út.

- *Um tit fara at gera tað, so mugu tit gera tað fínt og so heimligt sum møguligt – ikki sum Ziskatrøð!*
- *Tit skulu hava í hyggju, at tað er ungdómur, ið skal búgva har!*
- *Tað skal vera frítt at liva, og tey sum koma at búgva á kollegium skulu kunna gera tað sama sum heima!*
- *Tað mugu vera ávísar "ordansreglur" á einum slíkum stað!*
- *Har skulu var nokk av aktivitetum og ræðuliga nýmótans!*

Umframt hesar viðmerkingarnar, so vóru eisini fleiri viðmerkingar, ið vístu til, at tørvur eisini er á íbúðum á kollegiinum, so pør – eisini pør við børnum – kunnu flyta á eitt møguligt kollegium.

## Samandráttur

Endamálið við kanningini, ið hendan frágreiðing er grundað á, kann í stuttum býtast í trý:

- *At kanna hvør tørvurin er á einum kollegium í Klaksvík*
- *At kanna hvør hevur tørvin*
- *At kanna hvat ungdómurin heldur um ætlanina at byggja eitt kollegium*

### *Tørvur er á einum kollegium*

Greitt er, at ungdómurin metir, at tað er tørvur á einum kollegium í Klaksvík: hetta svaraðu fleiri enn 62 % av teimum, ið svaraðu spurnarblaðnum. Harumframt vísti meiri enn helvtin av teimum, ið svaraðu spurnarblaðnum, eisini á, at tey *uttan iva* ella *møguliga* høvdu flutt á kollegium, um tilboðið varð givið teimum.

Hvussu stórt tal av ungfólki hevði gjørt nýtslu av einum kollegium, er eitt sindur truplult at meta um. Beinleiðis spurd um tey høvdu flutt á eitt kollegium, um tilboð var um tað, siga 25 greitt *ja*, meðan 90 siga *ja, møguliga*. Hugsandi er, at tað umframt hesi er ein *goymdur tørvur* millum tey heimabúgvandi, og talið av teimum, ið høvdu komið til Klaksvíkar, um møguleikarnir fyri innivist vóru betri.

### *Tørvurin – hvør og hví?*

Tá ið spurt verður, *hvør* hevur tørv á einum kollegium, so kunnu svarini flokkast í trý:

- fyrst og fremst ung undir 20 ár, ið búgva heima
- harumframt eru eisini nøkur í sama aldri, ið búgva aðrastaðni enn heima, men ikki í 'vanligum' leigumálum (skúlaheimi, Sjómansheiminum, hjá familju)
- tey, ið búgva til leigu á privata marknaðinum

Út frá viðmerkingunum, ið tey ungu hava gjørt í spurnarblaðnum, ber til at siga eitt sindur meiri um, *hví* tørvur er á einum kollegium. Sambært svarunum hjá teimum ungu eru tríggjar høvuðsgrundir fyri tørvinum á einum kollegium:

- Eitt kollegium hevði gjørt tað møguligt hjá ungum at flut heimanifrá
- Næmingar og lærlingar (í Klaksvík) hava einki at búgva í
- Eitt kollegium skal nøkta tørvin hjá ungum, ið koma til Klaksvíkar at í skúla ella í læru

Fyri tey heimabúgvandi tykist kostnaðurin fyri at búgva á einum kollegium at vera sera avgerandi fyri, hvussu nógv fara at gera nýtslu av tilboðinum um at flyta á eitt kolleg-

ium. Hetta er ikki í sama mun galdandi fyri tey, ið koma uttaneftir ella búgva aðra staðni enn heima.

Harumframt er tað eisini munur á, hvussu akuttur tørvurin hjá teimum ungu er. Hjá teimum heimabúgvandi er tørvurin ikki so akuttur, tí tey kunnu velja ímillum at búgva heima og flyta aðrastaðni, meðan tørvurin hjá t.d. teimum, ið koma aðrastaðni frá, er meiri akuttur, tí tey hava ikki tað stóra í at velja. Í grannalondum okkara er tað ikki óvanligt, at ein partur av kollegiu-plássunum fyrst og fremst fer til at nøkta tørvin hjá ungum uttaneftir, ið koma til býin í útbúgvingarørindum.

### *Ungdómurin vil hava ávirkan*

Sum heild vísir kanningin, at ungdómurin heldur tað vera eitt gott hugskot at fara undir at byggja eitt kollegium. Hartil vísir kanningin greitt, at tey ungu vilja hava ávirkan á, hvussu eitt kollegium verður bygt. Tað vil siga ávirkan á m.a. hvussu tað verður bygt, hvørji fasilitetir skulu vera,herundir at møguleiki skal vera at velja ímillum kamar og íbúð. Harumframt verður eisini víst á, at tað er umráðandi at tað er hugnaligt og heimligt.

# Fylgiskjal 1.

## Spurnarkanning um ungdómskollegium í Klaksvík



Klaksvíkar kommuna hevur sett sær fyri at seta øllum undir útbúgving í Klaksvík, henda spurningin:

**Er tørvur á einum kollegium í Klaksvík/Norðoyggjum?**

Bakgrundin fyri hesum er, at nógvir skúlar og lærustøð eru í býnum, og Klaksvíkin fer eisini í framtíðini at mennast sum skúlabýur. Møguligt skal eisini vera hjá ungdómum aðrastaðni frá at koma higar og gera brúk av okkara skúlatilboðum. Hetta krevur ein skipaðan bústaðar- og ungdómspolitikk, og at byggja eitt kollegium er ein týðandi partur av hesum politikki.

Neyva endamálið við hesi spurnarkanningini er at finna fram til, hvat ungdómurin í býnum sjálvur heldur um byggjan av kollegium, og í hvønn mun tey sjálvi høvdu gjørt brúk av einum tílíkum tilboði.

***Hvat er eitt kollegium?***

- Eitt kollegium er eitt íbúðarstað til ung undir útbúgving (t.v.s. næmingar, lesandi og lærlingar).
- Eitt kollegium er vanliga samansett av kømurum og/ella smáum íbúðum til einstaklingar ella pør.
- Á einum kollegii eru ofta møguleikar fyri felags fasilitetum: hugnastovum, køkum, høli til ítriv.
- Prísurin er lagaður til fíggjarligu orkuna hjá teimum ungu (tó oftani stórur partur av teirra mánaðarligu inntøku).

Spurnarkanningin verður gjørd av næmingum og lærarum á Tekniska Skúla í Klaksvík og Grannskingardepilinum fyri økismenning fyri Klaksvíkar Kommunu.

November 2001

## Spurnarblað

**1. Persónligir upplýsingar:**

Aldur: ________ ☐ drongur ☐ genta ☐ stakur ☐ samlivandi

Um tú eigur børn, so hvussu nógv: ________

☐ Næmingur
☐ Lærlingur
☐ Í arbeiði
☐ Arbeiðsleys(ur)

**2. Hvar býrt tú?**

☐ Hjá foreldrunum
☐ Hjá familjuni
☐ Til leigu
☐ Í egnari íbúð/húsi
☐ Aðrastaðni - hvar? ________________________________

**Um 5 ár eri eg:** (svara antin spurningi 3 ella 4, set gjarna fleiri krossar)

***3. Framvegis í Klaksvík / Norðoyggjum***

☐ tí eg ætli mær at arbeiða her
☐ tí her er gott at vera
☐ tí eg eri forlovað/ur
☐ tí eg havi familju / børn

***4. Fluttur úr Klaksvík / Norðoyggjum***

☐ tí eg ætli mær undir víðari útbúgving
☐ tí arbeiði er ikki til mín her
☐ tí míni ítriv ikki finnast her
☐ tí frítíðartilboðini ikki eru nóg góð her
☐ tí eg tími ikki at vera í Klaksvík

**5. Áðrenn tú hoyrdi/las um hesa kanningina, visti tú tá hvat eitt kollegium er?**

☐ Ja
☐ Nei

**6. Heldur tú tørvur er á einum kollegium?**

☐ Ja. Hví? ________________________________
☐ Nei. Hví? ________________________________
☐ Veit ikki

**7. Hevði tú flutt á eitt kollegium um møguleikin stóð tær í boði her og nú?**

☐ ja, uttan iva
☐ ja, møguliga
☐ nei, tími ikki
☐ nei, men kanska seinni
☐ nei, als ikki

**8. Heldur tú onkur av tínum vinfólkum høvdu gjørt brúk av einum tílíkum tilboði?**

☐ ja, fleiri
☐ kanska onkur
☐ nei, eingin

**9. Er tað nakað, ið kundi forða tær í at flutt á kollegium?**

☐ Ja Hvat?: ________________________________
☐ Nei

**10. Skal ungdómurin hava møguleika at ávirka hvussu eitt kollegium skal byggjast?**

☐ Ja
☐ Nei

**Møguligar viðmerkingar:** ________________________________

________________________________